# Fiskivinnan siglir vandasjógv

**Fiski- og lívfrøðingar rópa varskó. Um vistfrøðiskipanin uppførir seg, sum hon plagar, so kann verða stór niðurgongd í fiskastovnunum næstu árini. Gróðurin, sum er grundarlagið fyri øllum lívi í sjónum, er dottin niður á sama botnstøði, sum tá fiskivinnan kollsigldi**

LÍV OG GRÓÐUR
*Ingi Rasmussen*

– Neyvt samband hevur verið millum gróður og framleiðslu av fiski á landgrunninum. Nú er gróðurin so lítil, at vit kunnu vænta, at nógv minni kemur undan, og fiskurin verður rak, sigur Eilif Gaard, havlívfrøðingur.

– Um sambandið heldur sær, soleiðis sum tað hevur gjørt síðstu tólv árini, so bendir alt á, at tað verður ein ógvuslig minking í nýggjum tonsum av fiski, sum koma afturat, sigur Petur Steingrund, fiskifrøðingur.

Teir báðir hava neyvt innlit í, hvussu gróðurin av plantuæti ávirkar, hvat kemur undan av fiski í havinum kring Føroyar. Og útltini eru alt annað enn góð, soleiðis sum gongdin hevur verið síðstu árini.



*Petur Steingrund, fiskifrøðingur, og Eilif Gaard, havlívfrøðingur, staðfesta eitt greitt samband millum gróður í sjónum og tilgongd av fiski. Tað sær ikki gott út fyri fiskivinnuna*

## Gróður í botni

Kanningar, sum Eilif Gaard hevur gjørt á Fiskirannsóknarstovuni síðstu tólv árini vísa, at gróðurin á landgrunninum er komin heilt niður á sama støði sum í 1990. Tá vóru nøkur álvarslig rakár í føroysku fiskivinnuni og harvið tjóðini allari.

Gróðurin í føroyskum sjógvi kemur oftast í aprílmai mánaði og heldur sær vanliga til september. Nøkur ár kemur gróðurin tíðliga á árinum, onnur ár kemur hann seinni. Nøkur ár er nógvur gróður, onnur ár er hann minni. Tað vísir seg, at tá gróðurin kemur seint, er lítið av gróðri.

Í byrjanini av 1990 var sera lítil gróður, og gróðurin kom eisini seint á árinum. Í fyrru helvt av 90-unum øktist gróðurin ár um ár, og hann kom eisini fyrr á árinum. Í 1996 minkaði gróðurin niður í helvt, men síðan øktist hann aftur nógv í 2000 og 2001. Tá var umleið fimm ferðir meiri gróður enn í 1990. Men í 2002 kom gróðurin seint á árinum, og hann var óvanliga lágur – á sama støði sum í 1990 og 1991.

Hetta er ein ógvuslig minking, ásannar Eilif Gaard, havlívfrøðingur, sum hevur staðið fyri kanningini.




*Føðiketur í sjónum. Grundarlagið undir øllum lívi er gróðurin av plantuæti.*

## Neyvt samband

Neyvt samband er millum gróðurin á landgrunninum og fiskastovnarnar, vísa allar royndir higartil.

– Tey árini, tá kanningar eru gjørdar av gróðri, hevur verið neyvt samband millum gróður og framleiðslu av fiski á landgrunninum, staðfestir Eilif Gaard, havlívfrøðingur.

Petur Steingrund, fiskifrøðingur, vísir eisini á greiða sambandið millum fiskaframleiðslu og gróðurframleiðslu. Í byrjanini av 1990 árunum var lítið til av fiski, hann var rak og vaks spakuliga. Hetta batnaði nógv fram til 1996. Í 1997, árið eftir at gróðurin minkaði, hevði fiskurin aftur minni at eta. Síðan batnaði skjótt aftur og seinastu 2 til 3 árini hevur hann havt nógva føði. Nógvur fiskur er komin undan, og hann hevur vaksið væl.

## Vánalig útlit

Spurningurin er so, hvussu verður hjá fiskivinnuni frameftir, nú gróðurframleiðslan er í botni. Petur Steingrund er óttafullur.

– Vit vita ikki, hvussu verður við gróðrinum næsta ár. Men heldur mynstrið sær, so skuldi tú trúð, at talið av tonsum, sum koma afturat árini 2003 og 2004, verður lágt, sigur Petur Steingrund.

Støðan er ikki hættislig fyri fiskivinnuna beint nú, tí so nógv er til av fiski. Fiskifrøðingurin sammetir tað við eina kontu í bankanum.

– Í løtuni er nógv á kontuni, men tað kemur onki inn á hana. Gongur tað, sum vit higartil hava sæð, so ganga nøkur ár, har lítið kemur inn aftur á kontuna – og so ræður um, ikki at brúka ov nógv, sigur hann.

Eilif Gaard vísir á, at mynstrið higartil hevur verið, at gróðurin skramblar niður á botn, tá hann lækkar, men byggir seg spakuliga upp, tá hann økist. Um tað verður gongdin aftur hesaferð, so ganga nøkur ár, áðrenn gróðurin av plantuæti, sum alt lív í sjónum er treytað av, hevur bygt seg uppaftur.




*Gróðurin í sjónum er komin niður á sama støði sum í 1990, og so eru vánalig útlit hjá fiskinum at vaksa og nørast*

## Slánar spøkja

Óvanliga nógvur toskur er at fáa inni undir landi fyri tíðina. Slánar kalla vit teir, tí teir eru stórir og rak. Og teir staðfesta úrslitini av kanningini hjá Fiskirannsóknarstovuni um gróðurin í sjónum.

Slánarnir vísa okkum, at fiskurin kemur undir land at finna sær føði. Og tað ger hann, tí onki er eftir at eta á landgrunninum.

Hetta er ikki gott tekin fyri fiskvinnuna, tí vit fáa onki gjørt fyri at broytt gróðurin.

Veiðiorkan er stór, so skjótt er at fiska tað, sum er, samstundis sum lítið kemur undan.

Tað er bara eitt at gera, halda lív- og fiskifrøðingarnir, og tað er minka um veiðiorkuna, so fiskivinnan sleppur undan teimum stóru sveiggjunum. Men tað er ein politiskur spurningur.

**-ir**



# Finalistarnir til oljuspælið Xplore funnir



*Hallur, Gunnleivur og Rói manna annan av bólkunum frá Tekniska skúla í Klaksvík, sum hevur ognað sær sess í finaluni í Xplore spælinum*

**Sosialurin skrivaði herfyri um eitt telduspæl, Xplore, sum er um oljuleiting, har næmingar á miðnámsskúlunum kappast um at finna olju. Nú eru innleiðandi umførini av, og fimm bólkar eru eftir av teimum 66, sum byrjaðu. Finalan verður 29. november**

OLJUSPÆL
*Solby A. Eliasen*

Næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík hava eisini luttikið í hesi kappingini. Og tað var ein bólkur frá teimum, sum endaði ovast í stigum nú bert finalan er eftir. Teir, ið manna henda bólkin eru: Hallur Joensen, Rói Jacobsen og Gunnleivur Biskopstø. Teir ganga allir á HT 2.

– Vit fingu at vita, at um allur flokkurin teknaði seg til kappingina, so fóru tímar at verða settir av tímatalvuni til kappingina. Men um vit meldaðu til sum einstaklingar, so mátti vit luttaka uttan fyri skúlatíðina, greiða teir frá og leggja so skemtandi afturat, at teir harvið vórðu noyddir at luttaka, tí tað var ein flokssamtykt.

Men tað kunnu teir tríggir so fegnast um í dag, tí teir eru komnir víðari í finaluna, sum besti bólkur við 1.609 ROI. Tað merkir return on investment ella mest vunnið fyri hvørja brúkta krónu. Og sum skilst so er hetta eitt rættiliga gott úrslit, sum teir hava arbeitt seg fram til.

– Um spælið var veruleiki, so høvdu vit verið ríkir í dag, siga teir tríggir og flenna.

Teir duga ikki at siga, um peningurin, sum teir hava havt til taks at arbeiða við samsvarar við veruleikan, men alt hitt, sum hevur við spælið at gera samsvarar avbera væl.

– Um vit ikki luttóku í hesum spælinum, so høvdu vit ikki vitað ein brotpart av tí, sum vit nú vita um oljuvinnuna, eru teir allir á einum máli um.

Og tað er nevniliga endamálið við hesum spælinum. At læra ungdóm í Føroyum meira um oljuleiting og vinnuna sum heild. Tað halda teir tríggir er eydnast fyrireikarunum til fulnar.

## Xplore

Spælið byrjaði 4. november og hildið varð fram í tvær vikur til finalistarnir vóru funnir. Teir tríggir greiða frá, at tað vóru trý útbjóðingarumfør og so ráddi um at bjóða rætt og hægst. Teir vísa eina plátu, sum er býtt upp í smáar blokkar, sum luttakararnir so bjóðaðu uppá. Ikki fekst at vita, hvat aðrir møguligir bjóðarar høvdu bjóðað, so tí ráddi um ikki at bjóða ov lágt. Tann, ið átti hægsta boð fekk so blokkin. Og so var bara at fara í gongd við at leita og vita, um nøkur olja var.

Teir siga, at hetta spælið eins væl og onnur spøl eisini hevur nógv við hepni at gera og vísa á, at teir vóru sera hepnir í øðrum útbjóðingarumfari. Tá høvdu teir bjóðað upp á tríggjar blokkar, sum tað ikki eydnaðist teimum at fáa og tískil bleiv ein blokkur tilvildarliga tillutaður teimum. Hesin blokkur vísti seg so, tá farið varð at bora, at vera fullur av olju.

Spurdir um tað er spennandi at luttaka í einum tílíkum spæli, siga teir, at longri tað leið út á kappingina, meiri spennandi bleiv tað.

– Serliga tað seinasta korterið var spennandi, tí tá lógu vit bert 0,5 prosent frammanfyri nummar tvey. Men teir funnu ikki nakað í teirra blokki og so vunnu vit at enda við umleið trimum prosentum, greiðir ein teirra frá.

Teir siga, at teir høvdu ikki trúð, at tað var so nógv at vita, tá tað kemur til oljuvinnuna, og teir fegnast samstundis um, at teir hava fingið henda møguleikan til at ogna sær so nógva vitan um hana.

– Hetta er ein fínur háttur at læra okkum ungdómar, tí um vit skuldu lisið okkum til alt hetta, sum vit nú hava lært, so hevði so gott sum onki sitið eftir í høvdinum. Tí ein lærir best við at sleppa at royna seg sjálvur, siga teir tríggir, sum eru spentir til finaluna, sum verður á skrivstovuni hjá Agip fríggjadagin 29. novembur, og tá hittast teir fimm bólkarnir í stríðinum um at gerast vinnari av kappingini og 15.000 krónum.

**Bólkarnir, sum fara at kappast í finaluni, eru:**

**Tekniski skúli í Klaksvík**
Hallur Joensen
Rói Jacobsen
Gunnleivur Biskopstø

**Studentaskúlin og HF skeiðið í Eysturoy**
Sveinur Justinussen
Jaspur Højgaard
Hallur Simonsen

Rakul Mortensen
Súsanna K. Nielsen
Mary Højgaard

**Føroya Handilsskúli, Kambsdalur**
Unn Laksá
Birgit Johannesen
Elsa Olsen
Absalon í Gerðum

**Tekniski skúli í Klaksvík**
Hjalmar Andreassen
Helgi Hvannastein
Julius Biskopstø
Jógvan Gerðalíð

Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 12-09-95
Km.: 93.000
Prísur: 62.000,-

TOYOTA PICNIC 2,2 D STW. 6 SETUR
Skrás.: 07-01-99
Km.: 81.000
Prísur: 172.000,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 2,0 D SEDAN
Skrás.: 12-08-97
Km.: 206.000
Prísur: 79.000,- Garanti*

FORD ESCORT 1,8 TD
Skrás.: 30-07-98
Km.: 82.400
Prísur: 89.000,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 HATCHBACK
Skrás.: 28-09-99
Km.: 32.000
Prísur: 92.000,- Garanti*

FORD MONDEO FLAIR 1,8 TD
Skrás.: 27-08-98
Km.: 132.000
Prísur: 110.000,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 G6 HATCHBACK
Skrás.: 28-06-00
Km.: 23.000
Prísur: 134.000,- Garanti**

HONDA ACCORD 1,6
Skrás.: 28-04-00
Km.: 35.000
Prísur: 158.000,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 AUT. SEDAN
Skrás.: 12-12-95
Km.: 95.000
Prísur: 72.000,-

HONDA CIVIC AUT.
Skrás.: 19-06-96
Km.: 57.000
Prísur: 95.000,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 XLI STW.
Skrás.: 05-01-96
Km.: 104.000
Prísur: 68.000,-

MAZDA 323 2,0 D SEDAN
Skrás.: 15-06-01
Km.: 127.000
Prísur: 88.000,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 D XL
Skrás.: 03-09-97
Km.: 123.000
Prísur: 117.000,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS SOL 2,0 TD SEDAN
Skrás.: 17-12-98
Km.: 125.000
Prísur: 139.000,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 D XL
Skrás.: 27-06-95
Km.: 203.000
Prísur: 79.000,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS SOL 1,8 SEDAN
Skrás.: 23-09-98
Km.: 77.000
Prísur: 134.000,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 D XL
Skrás.: 18-07-97
Km.: 120.000
Prísur: 107.000,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS SOL 2,0 AUT.
Skrás.: 14-10-99
Km.: 147.000
Prísur: 132.000,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 SLI LIFTBACK
Skrás.: 14-02-96
Km.: 116.000
Prísur: 94.000,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS TERRA 1,8 SEDAN
Skrás.: 25-05-00
Km.: 40.000
Prísur: 147.000,- Garanti**

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN

** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

STØKK INN Á GÓLVIÐ

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00
Vegurin Langi - 188 Hoyvík - Tel. 313040